# Føroyar evarska lítlan týdning

**Føroyar og føroyskur trygdarpolitikkur fyllir lítið í hugaheiminum hjá okkara grannum og stórveldunum Russlandi og USA. Tað má verða niðurstøðan eftir ráðstevnuna hjá Norðuratlantsbólkinum um trygdarpolitikk á Christiansborg í gjár**

RÁÐSTEVNA

*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Christiansborg, Keypmannahavn:** Í gjár skipaði Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi fyri einari ráðstevnu um framtíðar trygdarpolitikk í Norðuratlantshavi. Endamálið við ráðstevnuni var at varpa ljós á nýggju trygdarpolitisku støðuna hjá londunum í Norðuratlantshavi eftir kalda kríggið. Skal kjakið á ráðstevnuni takast sum mát, so verður leikluturin hjá Føroyum á trygdarpolitiska økinum millum lítil og



*Løgmaður kom nakrar minuttir ov seint og heilsar her upp á luttakararnar*

eingin í framtíðini, tí Føroyar og føroyskur trygdarpolitikkur fingu lítla rúmd á ráðstevnuni.

### Øðrvísi raðfesting

Millum gestirnar á ráðstevnuni var Søren Gade, danskur verjumálaráðharri, og hann fekk ein greiðan spurning viðvíkjandi trygdarpolitisku støðuni í Føroyum. Danski verjumálaráðharrin var biðin at greiða nærri frá, um avgerðin hjá dønum at rigga av í Mjørkadali var eitt tekin um, at danir í framtíðini ætla at lata onnur lond ella felagsskapir taka sær av trygdarspurningum í Føroyum.

- Nei tað ætla vit avgjørt ikki. Vit standa framvegis fyri sjóverjuni og eftirlitinum av loftrúminum í Føroyum. Hinvegin eru vit noyddir at fyrihalda okkum til, at heimurin er broyttur síðan kalda kríggið, og hetta krevur, at vit eru noyddir at gera nakrar nýggjar raðfestingar á trygdarpolitiskaøkinum. Hetta er fyrst og fremst orsøkin til, at vit hava valt at rigga av í Føroyum, segði Søren Gade.

### Fáorðaður

Millum mest forkunnugu nøvnini á ráðstevnuni vóru umboð fyri risarnar undir kalda krígnum, USA og Russlandi. Hvørki russiski ella amerikanski sendimaðurin í Danmark høvdu stórvegis at siga um Føroyar.

James Palmer Cain, amerikanskur sendimaður í Danmark, fekk eftir sítt upplegg eisini nakrar ítøkiligar spurningar viðvíkjandi Føroyum, men amerikanski sendimaðurin snúgvaði sær snillisliga undan at svara. Hann bleiv spurdur, um USA hevði nakra støðu til, um einar møguligar frælsar Føroyar gjørdust partur av NATO-samstarvinum, og um hann kendi nakað til fangaflutning av í føroyskum loftrúmum. Í báðum førum setti amerikanski sendimaðurin seg ikki føran fyri at svara.

James Palmer Cain boðaði annars frá, at hann komandi vár kemur til Føroya á vitjan. Ikki fekst at vita nærri, hvørji ítøkiligu ørindini vera hjá amerikanska sendimanninum í Føroyum.



*Høgni Hoydal, Søren Gade, James Palmer Cain*

### Grønland

Støðan hjá Grønlandi fekk hinvegin stórt pláss á ráðstevnuni. Ikki óvæntað bleiv Thule støðin nógv umrødd. Nærum allir luttakararnir vístu á týdningin av Thule støðini. Amerikanski sendimaðurin var rættiliga bersøgin.

- Norðurkorea er í dag vandamiklasti staturin í heiminum, og Norðurkorea mennir vápn, sum áðrenn vit vita av kunnu hótta okkum í USA og í tí sambandi hevur Thule støðin ómetaliga stóran týdning fyri okkara trygd, segði James Palmer Cain.



Móttøka

Í sambandi við, at Andras Róin fer frá, og Kristian R. Davidsen tekur við sum stjóri á Føroya Tele, vilja vit bjóða til almenna móttøku í Klingruni í Hoyvík fríggjadagin 8. desember kl. 14.00 - 16.00.

Øll eru vælkomin

FØROYA TELE